Landsspítali



# Blóðþynnandi aftaná keisaraskurð

## Vegleiðing í at sproyta seg við Fragmin (blóðtynnandi) í búkin:

Tak við 2 fingrum um eina húðarlegd á búkinum (sí mynd). Prika nálina í húðarlegdina við einum vinkli uppá uml. 45˚. Trýst stemplið spakuliga í botn (uml. ½ min.), bíða í nøkur sekund, so vætan kann spjaða seg undir húðini, áðrenn nálin verður tikin úr aftur.



Mynd: Fragmin verður sproyta inn í húðarlegd.



Fragmin eigur at vera sproytað beint undir húðina, í einum U-formaðum umráði, niðanvert nalvan (sí mynd) – í minsta lagi 5 cm. frá nalvanum. Fragmin kann eisini sproytast í lærið.

Fragmin sproytan inniheldur eina luftbløðru. Hendan skal ikki koyrast úr áðrenn sproytað verður, men skal liggja við stemplið, soleiðis at luftbløðran verður sproytað gjøgnum nálina at enda. Hetta ger, at onki Fragmin verður eftir í nálini.



Mynd: U-formað umráði

**Gevið gætur !**

- **Sproyturnar skulu goymast í stovuhita – í mesta lagi 25˚**
- **Sproyta teg um somu tíð hvønn dag**
- **Minst til at koyra proppin á aftur nálina, áðrenn sproytan verður burturbeind á tryggan hátt, t.d. í einum tómum mjólkarpakka.**

Landssjúkrahúsið
Føðideildin
www.ls.fo